# Bjørn skal venja leirvíkingar

**LÍF formaðurin sigur, at teir halda seg hava manningarligar fyritreytir at fara undir miðvíst arbeiði at byggja nýtt lið**

LÍF VENJARIN
*Jóannes Hansen*

Bjørn Krog skal næsta ár hava ábyrgdina av fótbóltsvenjingini í Leirvík. Hann skal venja liðið í 2. deild, og hann skal hava høvuðsábyrgdina fyri venjingini í hinum deildunum. LÍF formaðurin, Jógvan Júst Olsen, sigur, at ætlanin er, at høvuðsvenjarin skal vegleiða og vera íblástur hjá venjarunum í yngru deildunum. Bjørn, sum arbeiðir á studentaskúlanum á Kambsdali, hevur verið venjari í nógv ár. Longu fyrst í áttati árunum var hann spælandi venjari hjá VB. Áðrenn hann fór aftur til Danmarkar, spældi hann við HB. Í 2000 var Bjørn venjari hjá B68, síðani hevur hann verið hjálparvenjari í Gøtu, áðrenn hann fór at venja yngru deildirnar í Leirvík, har hann býr.

Í ár noyddist LÍF at luttaka í endaspæli, áðrenn tað var greitt, at teir eisini næsta ár skulu spæla í 2. deild. Sambært LÍF formanninum, so fara tað at ganga nøkur ár, áðrenn teir rokna við, at besta liðið hjá teimum verður ment til tað, sum teir halda, at møguleikar eru fyri.

– Vit eru komnir har til, at vit halda tað vera rættast at fara undir at mynda eitt nýtt lið. Í yngru deildunum hava vit havt nógv fólk tey seinastu árini. Í ár var Bjørn Krog venjari hjá dreingjunum og unglingunum. Áhugin var stórur, og vit ætla eisini næsta ár at taka lut í unglingadeildini, dreingjadeildini og eisini í uppaftur yngru deildunum. Vit eiga fleiri evnaríkar spælarar, sum eru 16–18 ára gamlir, og vit vóna, at fleiri teirra fara at vera við í kappingini um plássini á besta liðnum. Um trý ár vóna vit, at nógvir av hesum fara at vera við til at mynda eitt lið, sum vit rokna við kann fara at eiga góða framtíð, sigur Jógvan Júst Olsen, formaður í LÍF.

Tað ættarliðið, sum var við, tá ið LÍF inntil fyri tíggju árum síðani var í bestu deildini, er mest sum burtur í fótbóltinum í Leirvík. Teir hava hesi seinastu árini havt fleiri útlendingar á liðnum, og harafturat hava teir onkrar heimligar spælarar, sum eru miðskeiðis í tjúgunum.

– Tað er neyðugt at hava spælarar, sum eru í ymsum aldri. Hóast ungir spælarar eru evnaríkir, so vita vit, at teir ikki einsamallir megna at lyfta eitt fótbóltslið. Tí fara vit sjálvandi framvegis at hava spælarar, ið hava royndirnar, á liðnum. Fleiri útlendingar hava verið í Leirvík og spælt fótbólt. Hesi seinastu árini hava tað fyrst og fremst verið pólverjar. Onkrir teirra eru búsettir í Eysturoy. Tað kann væl vera, at teir eisini næsta ár fara at spæla við LÍF, men felagið fer ikki við pengum at draga útlendskar spælarar til felagið. Vit hava ikki umstøður við pengum at kappast um spælarar. Norðoya Sparikassi er høvuðsstuðul hjá okkum, og virkini í bygdini og bygdarfólkið sum heild tekur væl undir við felagnum. Men tað er ikki hugsningur um hjá okkum at vera við til at bjóða og yvirbjóða, sigur Jógvan Júst Olsen.

*Kvíga tit ikki fyri at missa spælarar til hini seks 1. deildarfeløgini í oynni?*

– Møguleikin er altíð har, og tað eru leirvíkingar, sum spæla í øðrum feløgum. Teir eru sjálvandi væl komnir at spæla við okkum næsta ár. Vit hava hoyrt, at onkrir av okkara spælarum skulu vera á veg í onnur feløg, men tað er einki ítøkiligt í tíðindunum. Vit rokna við, at allir, sum vóru við í ár, fara at vera við aftur næsta ár, og tað kann vera, at onkrir aðrir fara at koma afturat. Men enn er ov tíðliga at siga nakað um hetta.

Tvey tey seinastu árini hevur Bogi Lervig verið venjari hjá LÍF.

# NSÍ fær jugoslava av Skála

**Alexander Jovovic skiftur appelsin-litta Skála búnan út við tann gula hjá NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrsta mánaðin eftir kappingarlok í fótbóltinum plagar vanliga at vera nógvar søgur um flytingar av bæði leikarum og venjarum millum ymsu fótbóltsfeløgini, men í so máta tykist árið í ár vera eitt lítið undantak.

Tó so. Onkrar flytingar eru, og í einari av hesum hava runavíkingar tryggjað sær styrk til komandi kappingarári. Talan er um Alexander Jovovic, sum í fjør var partur av liðnum hjá Skála, har hann fyri tað mesta royndi seg á miðvøllinum.

Formaðurin í NSÍ, Jákup Mortensen, váttar, at nakað er um tosið, og hann tykist vera hampuliga fegin um, at felagið hevur styrkt hendan partin av liðnum.

- Vit vistu jú av, at Ian Højgaard flutti niður til Danmarkar eftir kappingina í fjør, og tí hava vit havt hug at styrkja um miðvøllin. Alexander vildi sjálvur sleppa at royna eina avbjóðing, sum var nærri oddinum, og hetta endaði so við, at hann nú verður partur av liðnum hjá okkum.

Júst kring NSÍ hava annars nógvar leysasøgur verið í heyst. Tað hevur ljóðað, at felagið nú av álvara hevur sett kikaran móti gullmerkjunum, og fleiri av teimum nøvnum, sum hoyra til avgjørda føroyska fótbóltsoddin, hava eisini verið sett í samband við felagið, men hesum avvísur Jákup Mortensen.

- Jú, jú. Hasar søgurnar hoyri eg eisini, og onkur av hasum leikarunum man vera seldur til okkum fleiri ár á rað skjótt. Men tað er í øllum førum ikki so, at vit liggja eftir fleiri nýggjum leikarum. Sjálvur haldi eg, at vit hava ein spennandi hóp at arbeiða við herinni, og tað vildi ikki verið rætta leiðin at gingið, um vit nú skulu keypa alt ov nógv fólk inn.

# Skoubo í Grikkalandi

**Fyrrverandi HB- og GÍ venjarin skal nú royna seg sum venjara hjá grikska Aris Saloniki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var eitt satt scoop, tá HB í 1983 kundi boða frá, at felagið hevði fingið fyrrverandi danska landsliðsleikaran, Ole Skoubo, sum spælandi venjara. Skoubo var av sonnum mettur sum ein av nomadunum innan danskan fótbólt, og eitt nú hevði hann á yrkisleiðini roynt seg í Grikkalandi, USA, Svøriki og í donskum fótbólti, sjálvandi, áðrenn hann ta ferðina kom til Føroya.

Seinni var Skoubo eisini venjari hjá GÍ, men hvussu var og ikki, so gjørdist tað sum so ikki til nakað alvorligt við venjarayrkinum. Í øllum førum ikki fyrr enn nú. Síðani 1994 hevur hann als ikki verið venjari, men hevur ístaðin arbeitt sum blaðmaður á Nordjyske Medier.

Grikska felagið, har Skoubo sum leikari varð mettur sum sonn hetja, hevur tó í fleiri umførum spurt seg fyri hjá honum, og nú hevur danin so avgjørt at taka av. Fyri fyrst hevur hann biðið um farloyvi frá blaðmannastarvinum í tríggjar mánaðir, og so er spurningurin, um hann framvegis stendur við einum starvi innan fótbóltin tá. Í øllum førum bera grikskir felagsstjórar ikki orð fyri at vera serliga tolnir.





















# Ljósið- triathlon

**Eitt fimleikalið hjá Ljósinum royndi seg um vikuskiftið í triathlon-kapping**

FIMLEIKATILTAK
*tíðindaskriv*

Fimleikafelagið Ljósið lýsti í heyst við einum tiltaki, har tey ið meldaðu til sluppu at royna seg í so nógvum ítróttagreinum sum teimum listi, og serliga slíkar sum fimleikarar ikki vanliga íðka. Felags fyri øll ið meldaðu til var, at tey so at siga ikki høvdu roynt tað Ljósið hesaferð hevði at bjóða teimum.

Hetta í sær sjálvum er spennandi, og er uppmøtingin eisin góð. Á liðnum eru einar 15-20 kvinnum í aldrinum 25 til 50 ár, og so ein hani, sum trívist sera væl. Liðið hevur síðani tað byrjaði, verið á sandinum í Sandagerði og spælt barnaspøl. Tey hava íðka duathlon, har tey hava blandað renning og súkkling, og fyri at vísa at tey eisini tora, vóru tey og sigu í berginum omanfyri Gomlurætt, og stóðu á rulluskoytum fyri at nevna nøkur ting tey hava gjørt.

Nú sunnudagin hevði liðið avgjørt, at triathlon skuldi vera á skránni, og sjálvt um tað var bæði vindur og regn, so vildu tær 9 kvinnurnar ið møttar vóru, ikki setast aftur. Ætlanin var at teinurin skuldi vera 1/12 triathlon, men av tí at vindurin var so nógvur, bleiv súkkluteinurin styttur niður í helvt, og hinar báðar greinirnar vóru so sum tær áttu.

Hesar djørvu kvinnurnar høvdu ikki nakrar smartar kappsúkklur ella sprøklut vatn- og vindtøtt súkkluklæðir. Nei, útgerðin var ein súkkla av ókendum slag, og so regnklæðir. Ein av kvinnunum segði, at tá hon kom til Skansan, legði hon til merkis, at súkklan hevði 7 gear, og ikki 3. Ein onnur rópti um hjálp, tí hon fann ikki bremsurnar, seinast hon var á súkklu vóru bara fótbremsur, og nú bara hondbremsur. So ikki kann annað sigast, enn at hesar kvinnur bara loypa í tað ókenda, og so taka støðuna sum hom kemur.

Fyrst svomu tær 350 m í Svimjihøllini, síðani skiftu tær, og so út á súkkluna, har tær súkklaðu 7,5 km eftir Norðara Ringvegi, fram við Strond, niðan Jónas Bronksgøtu og R C Effersøesgøtu, til tær at endan komu niðan aftur á Ringvegin og Hvítanesvegin, til Skógrøkt landsins, har tær skiftu til 3 km renning.

Fimm av kvinnunum gjørdu triathlon, tríggjar gjørdu duathlon, og ein svam. Men felags fyri allar var, at tær vóru sera væl nøgdar, og sjálvt um tær vóru gjøgnumbloyttars, so eru tær als ikki nakrar bloytur, og hvør veit, kanska menninir í Triathlonfelagnum ein dag vakna við kaldan dreym, kvinnurnar hava flaggað út heimanífrí til triathlon.

Tiltakið var ikki skipað sum kapping, tí allar ikki gjørdu alt, men til stuttleika bleiv tíð tikin til einstøku partarnar, so íðkararnir seinni kundu síggja hvat er teirra sterka ella veikasíða.




# FCK smokkaði í Parkini

**Munurin frá Brøndby og niður til FCK kann sunnudagin gerast so stórur, at tað verður meiri enn torført at vinna hann aftur**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Toppuppgerðin í 16. umfarinum var seint seinnapartin sunnudagin í Parkini, har FCK hevði vitjan av Esbjerg. Í 10. minutti løgdu gestirnir seg framum eftir hornaspark, og hetta vísti seg at verða sigursmálið. Sjey minuttir eftir Esbjerg málið, sum Tommy Bechmann skoraði, fekk FCK gyltan møguleika. Zuma, sum mannaði álopið saman við Peter Møller, varð feldur, men liðformaðurin, Peter Nielsen, sendi brotssparkið í stólpan.

22.220 áskoðarar vóru eygnavitni til sera intensiva uppgerð. Seinnapartin av seinna umfarinum var Álvaro Santos á vøllinum. Hann loysti Morten Bisgaard av. Sambært donsku miðlarnar var lítið krút í brasiliumanninum. Skoðsmálið, sum hann fekk í BT, var eitt fimm tal ella dumpi karakterur.

Í FCK vóru tey vónbrotin. Hetta var triðja ferðin í hesum kappingarárinum, at liðið einki fekk burturúr á heimavølli. Tað er ikki nóg gott, um hugsningur skal vera um at endurvinna DM heitið.

Esbjerg sigurin hevði við sær, at teir fóru trý frá FCK. Esbjerg hevur 36 stig, og FCK hevur 31. Oddaliðið Brøndby var leygardagin í Ikast, har teir vunnu 2–0. Bæði málini vórðu skorað í 1. hálvleiki, og talan var um sannførandi sigur og harvið hevnd fyri óvæntaða FCM sigurin í Brøndby fyri stórum mánað síðani.

Sunnudagin skulu Brøndby og FCK, sum bæði skulu spæla í UEFA Cup hóskvøldið, hittast í Brøndby. Tað stendur nógv á FCK, sum er sjey stig aftanfyri oddaliðið.

## Nýggja vón

Hjá OB, sum framvegis er á fjórða plássinum, hilnaðist vitjanin í Farum ikki væl. FC Nordsjælland, sum ikki hevði fingið fulla úrtøku í fimm teimum seinastu umførunum, vann 3–0, eftir at tað hevði verið málleyst í steðginum. Karismatiski FCN venjarin, Christian Andersen, takkaði leiðsluni fyri, at hon hevði keypt álopsspælaran Tommy Olsen – hann skoraði til 2–0 – í staðin fyri at geva venjaranum sekkin. Sigurin hevði við sær, at FCN lyfti seg upp um niðurflytingar strikuna.

Undir strikuni eru AB og Frem. AB tapti fyri tíggjundu ferð á rað. Teir eru nógv aftast, og um avrikini ikki batnað og kósin harvið vend, so fara teir at flyta niður. Hesa ferð løgdu teir rygg til 3–0 tap á heimavølli ímóti Viborg. Eydnan er sjáldan við botnliðunum. Tá ið einki var avgjørt, fekk AB bóltin inn um strikuna. Langskot brast í tvørtræið og niður í svørðin innanfyri málstrikuna, men linjuverjin lyfti ikki flagginum, og so tagdi dómarin.

Frem hevði vitjan av AGF. Eisini í aðru royndini við nýggjum venjara fekk AGF fult. Teir vunnu 2–1, men svenski venjarin, Sören Åkeby, var ikki nøgdur við leikliga avrikið. Hann helt, at spælararnir hjá honum orkaðu ikki nóg væl. Á heimaliðnum harmaðust teir, at tað ikki hevði eydnast teimum at fáa meiri burturúr, tí teir høvdu havt nógvar stórar møguleikar, sum AGF málverjin hevði vart fyri.

Hjá Herfølge sá leingi illa út. Í 61. minutti skoraðu gestirnir úr AaB til 3–1, men so vendi, og Herfølge megnaði at javna til 3–3. Síðsta málið fingu teir í yvirtíðini. Um teir høvdu spælt fimm minuttir afturat, so høvdu teir fingið sigursmálið, hildu teir í Herfølge.

# Partick Thistle tapti aftur

**Hóast málini skola ígjøgnum, so tykist venjarin ikki halda, at tað er neyðugt at skifta málverja**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er lítið hugaligt hjá Jákupi Mikkelsen í Glasgow. Felagið hjá honum, Partick Thistle, tapir og tapir, men venjarin tykist ikki halda, at málverjin, Kenny Arthur, eigur lut í tapunum. Í hvussu so er hevur hann ikki enn givið Jákupi Mikkelsen nýggjan møguleika, eftir at Jákup fyri meiri enn einum mánað síðani misti plássið ímillum stólparnar, tá ið hann var sjúkur í eina viku.

Venjarin, Gerry Collins, tykist ætla sær at halda fram, sjálvt um liðið hjá honum ikki enn hevur vunnið. Leiðslan hevur undirstrikað, at hon hevur fult álit á venjaranum, og í vikuskiftinum boðaði Gerry Collins frá, at tað kann roknast við, at einstakir spælarar fara at verða seldir í januar, tá ið hann ætlar at fáa nýggjar spælarar til felagið.

Leygardagin var uppgávan hjá Partick Thistle rættuliga stór. Teir vitjaðu meistaraliðið Glasgow Rangers. Úrslitið var 3–1 heimasigur, men sambært skotskar fjølmiðlar stóð Partick Thistle seg so mikið væl, at teir áttu at havt betri uppiborið, men teir vóru ikki nóg avgjørdir frammanfyri málinum hjá mótstøðuliðnum.

Danski Rangers spælarin, Peter Løwenkrands, var rættuliga eyðsýndur. Hann tiltuskaði sær frísparkið, sum í 8. minutti varð sent upp um manngarðin og í netið. Í 1. hálvleiki vóru gestirnir leikliga omaná, men teir fingu einki mál, og fimm minuttir undan steðginum økti Rangers til 2–0.

Tjúgu minuttir undan leikloki økti heimaliðið við brotssparki. Peter Løwenkrands varð feldur. Átta minuttir undan leikloki pyntaði Partick Thistle um.

## Úrslitið av triathlon-kappingini hjá Ljósinum

| Navn | Svimjing | 1.Skift | Súkkling | 2. Skift | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Anna Maria Troast | 0.08.02 | 5.28 | 17.23 | 0.15 | 19.02 | 0.50.10 |
| Marin Katr. Frýdal | 0.09.01 | 5.49 | 18.27 | 0.31 | 21.02 | 0.56.35 |
| Birgit Debes | 0.14.30 | 5.00 | 22.25 | 0.40 | 21.31 | 1.04.06 |
| Jocobina Hansson | 0.09.23 | 5.52 | 22.35 | 0.24 | 25.56 | 1.04.08 |
| Sigrun Samuelsen | 0.09.35 | 5.15 | 27.50 | 0.12 | 24.43 | 1.07.35 |
| Nanly Guðmundson | 0.16.23 | | | | 21.33 | 0.37.56 |
| Karin Jacobsen | 0.10.15 | X | X | X | 21.33 | 0.31.48 |
| Sonja Debes | 0.14.22 | X | X | X | 21.33 | 0.35.55 |
| Gunnleyg Durhuus | 0.08.50 | X | X | X | X | 0.08.50 |